H E I L S U F R Ø Ð I L I G A   S T A R V S S T O V A N

Nes Kommuna

FO-650 TOFTIR

Tórshavn, hin 16. juli 2004
Málnr.: 680-200400315-11
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

**Umhvørvisdeildin**

# Loyvi til aftursøkking

## 1. Loyvi og heimild

Sambært grein 2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, veitir Heilsufrøðiliga starvsstovan við hesum loyvi til at aftursøkkja umleið 4.000 $m^3$ av gróti, sum ætlanin er at taka upp av botni í sambandi við dýping av bátahylinum í Oyrunum í Nes kommunu.

Tilfarið kann aftursøkkjast vestan fyri verandi grótkast við bátahylin, á umleið 62° 05,78' N og 06° 44,54' W, sum víst á hjálagda korti.

## 2. Umsóknin

Hin 13. juli 2004 fekk Heilsufrøðiliga starvsstovan umsókn frá Nes kommunu um loyvi at aftursøkkja umleið 4.000 $m^3$ av gróti, sum ætlanin er at taka up av botni í sambandi við dýping av bátahylinum í Oyrunum. Í umsóknini verður søkt um loyvi at søkkja tilfarið vestan fyri verandi grótkast.

## 3. Ummæli

Sambært grein 5 í áðurnevndu kunngerð um aftursøkking, skulu umsóknir sendast til Fiskimálaráðið, Landsverkfrøðingin og avvarðandi kommunu til ummælis.

Hin 14. juli 2004 varð umsóknin send Fiskimálaráðnum og hin 15. juli Landsverki til ummælis.

Í skrivi frá Fiskimálaráðnum, dagfest 15. juli 2004, verður sagt, at umsóknin hevur verið til ummælis hjá Fiskirannsóknarstovuni og Skipaeftirlitinum.

Fiskirannsóknarstovan sigur í sínum ummæli, at av tí at talan bert er um grót, síggja teir ongar trupulleikar av lívfrøðiligum slagi við hesi ætlan. Skipaeftirlitið hevur ongar viðmerkingar.

Í skrivi frá Landsverki, dagfest 16. juli 2004, verður sagt, at Landsverk ongar viðmerkingar hevur til ætlanina.

Av tí at Nes kommuna søkir um loyvi, er umsóknin ikki send kommununi til ummælis.

## 4. Kanningar av botntilfarinum

Við tað, at talan er um grót, metir Heilsufrøðiliga starvsstovan, at tað kann verða flutt uttan vanda fyri dálking. Mett verður ikki neyðugt at gera kanningar av tilfarinum.

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

**5. Treytir**

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

5.1 Tilfarið verður søkt vestan fyri verandi grótkast, á umleið 62° 05,78' N og 06° 44,54' W, sum víst á hjálagda korti.

5.2 Aftursøkkingin kann ikki fara fram, fyrr enn kærufreistin sambært grein 8 er úti.

5.3 Heilsufrøðiliga starvsstovan skal í góðari tíð hava boð um nær arbeiðið byrjar. Eisini skal boðast frá, tá ið arbeiðið er liðugt.

5.4 Loyvið umfatar bara tilfar, sum er tikið upp av botni á økinum, sum er tilskilað í umsóknini.

5.5 Nøgdin, sum verður aftursøkt skal skrásetast saman við tíð, knattstøðu, dýpi og hvaðani tilfarið er tikið. Tá arbeiðið er liðugt, skal frágreiðing sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni um hvussu nógv er aftursøkt, tíð o.s.fr.

**6. Eftirlit**

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Nes kommuna skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann útinna eftirlitið.

**7. Gjald**

Nes kommuna skal, sambært kunngerð nr. 31 frá 8. mars 2001 *um gjøld eftir havumhvørvislógin*i, rinda fyri ta viðgerð, Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

**8. Kæruvegleiðing**

Hendan avgerð kann, sambært grein 10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum saman við neyðugum skjølum, sendir hana til landsstýrismannin.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Landsverk, Postrúm 78, 110 Tórshavn
Fiskimálaráðið, Postrúm 87, 110 Tórshavn
Nes kommuna, 650 Toftir
Landslæknin, Sigmundargøta 5, 100 Tórshavn

**Aftursøkking við bátahylin í Oyrunum í Nes kommunu**

